ÁRSROKNSKAPUR 2003

Í 1.000 kr.

Rakstrarroknskapur	2003	2002
Rentuinntøkur v.m.	291.047	301.241
Rentuútreiðslur v.m.	75.404	101.811
Rentuinntøkur netto	215.643	199.430
Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum	1.421	665
Ómaksgjøld og provisiónsinntøkur	20.439	16.815
Útreiðslur til ómaksgjøld og provisiónir	369	522
Rentu- og ómaksgjøld netto	237.134	216.388
Virðisjavning av virðisbrøvum og útl. gjaldoyra v.m.	23.080	11.729
Aðrar vanligar inntøkur	8.753	7.743
Úrslit av fíggjarpostum	268.967	235.860
Útreiðslur til starvsfólk v.m og umsiting	121.300	117.754
Av- og niðurskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum	10.181	15.772
Aðrar rakstrarútreiðslur	69	407
Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto)	309.249	17.959
Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum	447	-2.806
Úrslit av vanligum rakstri	-171.385	81.162
Skattur	-42.623	15.258
Ársúrslit	-128.762	65.904
Býtið av ágóða		
Ársúrslit	-128.762	65.904
Flutt frá yvirkursi við partabrævasølu	86.828	0
Flutt avlop	41.934	0
Tøkur peningur tilsamans	0	65.904
Nýtt til vinningsbýti	0	33.966
Burturlagt til aðrar grunnar	0	54
At flyta til næsta ár	0	31.884
Nýtsla av tøkum peningi	0	65.904

Fíggjarstøða	2003	2002
Ogn		
Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankum	72.554	55.190
Áogn í lánistovnum v.m.	294.831	143.415
Útlán	3.886.990	3.979.385
Lánsbrøv v.m.	520.247	679.366
Partabrøv v.m.	133.135	96.490
Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum	27.459	26.408
Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum	1.566	1.276
Óítøkiligar ognir	2.034	0
Ítøkiligar ognir	128.751	128.611
Egin partabrøv	46	54
Onnur ogn	122.451	81.843
Tíðarskeiðsavmarkingar	4.706	4.360
Ogn tilsamans	5.194.770	5.196.398
Skuld		
Skuld til lánistovnar og tjóðbankar	579.065	235.383
Innlán	3.786.192	3.947.217
Onnur skuld	69.510	125.173
Avsetingar til skyldur	6.407	6.194
Eginpeningur:		
Partapeningur	679.311	679.311
Ábyrgdarfæ	1.288	1.361
Yvirkursir við partabrævaútgávu	72.951	159.779
Javning til flutt avlop frá undanfarnum árum	0	10.042
Grunnur fyri egin partabrøv	46	54
Flutt frá undanfarnum árum	41.934	0
At flyta frá ársins úrsliti	-41.934	31.884
Eginpeningur tilsamans	753.596	882.431
Skuld tilsamans	5.194.770	5.196.398
Tøl, ið ikki eru tikin við í javna		
Ábyrgdir	111.637	104.760
Aðrar skyldur	0	25.098
Tøl, ið ikki eru tikin við í javna tilsamans	111.637	129.858

REPROZ

Aðalfundur hjá Ferðavinnuni í Eysturoy

Mikukvøldið 17. mars hevur nevndin fyri Ferðavinnuna í Eysturoy aðalfund í Róðrarneystinum hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ á Glyvrum.

Aðalfundurin byrjar kl. 19.00.

Umframt vanligu aðalfundarskránna skal endalig støða takast fyri luttøku í millumtjóða verkætlanini Norðurslóð, sum varar 3 fylgjandi ár.

Á fundinum verður eisini stutt framløga og kjak um nýggju økisferðavinnu-ætlanina fyri Eysturoy. Undir arbeiði framyvir, verður framløga og støðutakan til meira beinleiðis marknaðarføring av Eysturoynni uttanlanda. Viðtøkubroytingar um víðkan av nevndini skulu eisini takast upp á Aðalfundinum mikukvøldið.

Barnatiltak á Glyvrum

Sunnudagin 21. mars verður stórt barnatiltak og páskareggjatombola í kappróðrarneystinum á Glyvrum. Angela og Hannibal verða somuleiðis við.

Tað er Kappróðrarfelagið NSÍ sum skipar fyri tiltakinum. Barnatiltakið byrjar kl. 15.00 og páskareggjatombolaið, við 300 páskareggum, byrjar kl. 16.00.

Atgongumerkir á 50 kr. kunnu keypast við dyrnar.

Semja millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið

Sunnukvøldið gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið semju viðvíkjandi starvsfólkunum á Føroya Tele. Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum stendur at lesa, at semjan millum annað merkir, at lønin hjá starvsfólkunum á Føroya Tele hækkar 2,7% 1. mars í ár og 1. mars komandi ár. Harafturat hækkar eftirlønin við 1,5% somu dagar.

Eisini er avtala gjørd um, at tey starvsfólk á Føroya Tele, ið eru sett sambært omanfyrinevnda sáttmála, hava keypt sær tveir frídagar afturat um árið. Úrslitið av hesum sáttmála er á sama støði, sum aðrir sáttmálar ið Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt við eitt nú S&K og handverkarar.

tn

Stríðast um bíbliur

Dimmalætting hevði í gjár grein á forsíðuni, har víst varð á, at einans leinkja til bíbliutýðing Victors Danielsen var at finna á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum. Tann autoriseraða týðingin hjá føroysku fólkakirkjuni er týðingin hjá Jákupi Dahl. Victor Danielsen var abbi Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra, og blaðið setti spurning við, um tað var Jógvan á Lakjuni, ið hevði valt, at einans leinkja til týðing abba hansara skuldi verða á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Blaðið gjørdi kortini vart við, at tað ikki hevði fingið fatur á mentamálaráðharran, ikki á aðalstjóranum og ikki á fulltrúanum, ið hevði við málið at gera.

Í tíðindaskrvi í dag sigur Mentamálaráðið, at Dimmalætting mistekur seg. Ráðið sigur, at »hevði blaðmaðurin hjá Dimmalætting ómakað sær at trýst á fólkakirkjuna, so hevði hann eisini funnið bíbliuna í týðingini hjá Jákupi Dahl á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum«.

Mentamálaráðið ger eisini greitt, at hesi link hava verið á heimasíðuni síðani august í fjør – ella langt áðrenn Jógvan á Lakjuni gjørdist mentamálaráðharri.

Men Ingi Samuelsen, blaðstjóri á Dimmalætting, sigur í svari til tíðindaskrivið, at »leinkjan til bíbliutíðing próst Dahls ikki kom á heimasíðuna hjá Mentamálaráðharranum fyrr enn eftir at greinin hevði staðið í Dimmalætting.«

Men sambært Mentamálaráðnum mistekur Dimmalætting og blaðstjórin seg – og vísa tey aftur til sama tíðindaskrivið.

el

Innsavnan av undirskriftum gongur væl

Stigtakarin til undirskriftainnsavnina móti byggingini av skrivstovubygningi, har húsini hjá Anton Degn standa, Ingi Mohr, sigur innsavnina ganga stak væl

DEGNSHÚSIÐ
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Fríggjadagin í farnu viku var farið undir at savna inn undirskriftir móti ætlanini at byggja eini miðbýarhús í fimm hæddum, har gomlu húsini hjá Anton Degn standa. Stigtakarin til innsavningina, fyrrverandi býráðslmurin Ingi Mohr, sigur, at innsavningin hevur gingið stak væl. Mánadagin vóru okkurt um 1.500 undirskriftir savnaðar, og Ingi Mohr væntar, at millum 2.000 og 3.000 undirskriftir verða savnar, tá ið innsavningin er liðug seinni í vikuni.

Ingi Mohr, stigtakari til undirskriftainnsamlingina, sigur, at tað gongur stak væl at savna undirskriftir

Andin í býráðnum var at varðveita húsini

Ingi Mohr sigur, at eftir hansara tykki er tað eingin ivi um, at andin í Tórshavnar Býráð hevur verið at friða húsini, tí annars hevði man ikki játtað okkurt um 200.000 krónur til umvælingararbeiði.

Somuleiðis sigur Ingi Mohr, at tað er umráðandi at varðveita sirkulin av gomlum húsum kring Tinghúsvøllin við Degnshúsi, Gamla Bókhandil, Býráðshúsið, Býráðssalinum og Tinghúsinum.

Ingi Mohr hevur áður sitið í Tórshavnar Býráð, og har hevur hann sjálvur verið við til at geva eitt nú Havnar Klubba at byggja stórt, har gomul og smærri hús stóðu áður, so hvussu ber tað til, at hann nú savnar undirskriftir móti líknandi bygging. Til hetta sigur Ingi Mohr, at tað var skeivt at geva klubbanum byggiloyvi, men tað merkir ikki, at man skal halda fram við at gera mistøk.

Um skrivstovubygningurin verður bygdur, har Degnshús standa í dag, verður eisini tørvur á parkeringsplássum, sigur Ingi Mohr, og í hesum sambandi er vert at nevna, at tað er politikkur býráðsins, at bygningar, ið krevja parkeringsplass, verða fluttir út um býin, har pláss er at gera slík parkeringsøkir, sigur fyrrverandi býráðslimurin. Hann avsannar eisini, at tiltakið hjá honum er eitt lið í eini ætlan hjá honum at blíva valdur inn í býráðið aftur, tá val verður í heyst, tí hann sigur seg ikki hava tikið støðu til, um hann fer at stilla upp til býráðsvalið.

Omanfyri sæst eitt skitsuútkast til byggingina av nýggjum skrivstovubygningi. Myndina hava vit fingið frá arkitektinum, ið hevur gjørt projektið. Niðanfyri sæst ein støðumynd yvir økið. Báðar tekningarnar eru latnar býráðnum saman við umsóknini um prinsipielt byggiloyvi



Einki er ómøguligt hjá Inga Mohr

Í gjár skrivaðu vit, at tað var undrunarvert, at stigtakarin til innsavningina av undirskriftum hevði fingið fatur á tekning av ætlaða skrivstovubygngingum, tí at talan var um eina tekning, ið var latin umsiting býráðsins í trúnaði. Til hetta sigur Ingi Mohr stutt, at einki er ómøguligt hjá Inga Mohr. Somuleiðis sigur hann seg ikki ivast í, at húsini hjá Anton Degn verða friðið, tí tað fer at verða lurtað eftir borgarunum.

Jan Christiansen, borgarstjóri:

Neyðugt at endurskoða stuðulsveitingar

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, heldur tað verða neyðugt at endurskoða mannagongdina, tá ið stuðul verður latin til umvæling av gomlum húsum

MIÐBÝUR
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Í Sosialinum í gjár var greitt frá, at fyrrverandi eigarin av nógv umtalaðu Degnshúsunum hevði fingið okkurt um 200.000 krónur í stuðuli frá kommununi, tá ið húsini skuldu umvælast. Stuðulin varð veittur, tí at húsini skuldu varðveita sína gamla stíl, og tí at táverandi byggi- og býarskipanarnevnd býráðsins mettu húsini varðveitingarverd. Tískil varð stuðul veittur, men hóast stóru upphædd-ina setti býráðið ongan klausul í sambandi við stuðulsveitingina. Hetta merkir, at hóast kommunan lat so stóra upphædd til umvælingina, kann eigarin taka húsini niður ella flyta tey, uttan at kommunan fær gjørt nakað við tað.

Sjálvsagt skulu treytir setast

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at eftir hansara tykki er neyðugt at endurskoða mannagongdina, tá ið slíkur stuðul verður veittur. Hann heldur tað verða upplagt, at býráðið setir ávísar treytir, tá ið so stórur stuðul verður veittur, tí sum nú er ber til hjá eigaranum at ríva húsini niður dagin eftir, at stuðul er veittur, og tað ber ikki til, sigur borgarstjórin í Havn.

Annars hevur borgarstjórin í Havn ikki tær stóru viðmerkingarnar til málið, tí hann sigur seg ikki verða so innarlaga í málinum. Tað einasta, ið hann fyri vissu veit, er, at ein borgari hevur søkt um byggiloyvi á tí matrikul, har húsini hjá Anton Degn standa, og at bæði býararkitekturin og tekniski stjórin mæla til, at loyvið verður givið, tí nýbygningurin fylgir byggisamtyktini fyri økið.

Petur Olsen, eigari av Degnshúsi:

Ódámlig kensla at verða viðgjørdur í fjølmiðlunum

Høvuðspersónurin í øllum kjakinum viðvíkjandi bygging av skrivstovubygningi, har húsini hjá Anton Degn standa, er eigarin av húsinum Petur Olsen

DEGNSHÚS
Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Eigarin av Degnshúsi, Petur Olsen, hevur verið tættur sum tunnan, nú húsini hjá honum og ætlaði skrivstovubygningurin hevur verið nógv umtalaður í fjølmiðlunum síðstu tvær vikurnar. Men nú hevur hann hug til at gera nakrar viðmerkingar til málið.

Vónbrotin av landsantikvarinum

Petur Olsen sigur, at tað hevur verið ein stak óbehagilig kensla at síggja síni privatu viðurskifti verða viðgjørd í fjølmiðlunum síðstu tiðina, og hann sigur, at tað hevur verið ein sera tung tíð.

Somuleiðis sigur Petur Olsen seg vera sera vónbrotnan av landsantikvarinum, sum hevur verið alment frammí í fjølmiðlunum og úttalað seg um eina møguliga friðan av húsinum, áðrenn hann yvirhøvur hevur sett seg í samband við eigaran, og heldur ikki hevur verið og hugt at ognini. Petur Olsen sigur, at verða húsini friðið, má hann ansa sær, at hann ikki er inni, tí so verður hann allarhelst eisini friðaður.

Eigarin av Degnshúsi heldur tað eisini verða løgið, at fólk tosa um at friða húsini, tí húsini eru rættuliga nógv broytt, síðani Anton Degn búði í teimum. Millum annað var eldur í húsinum á vári 2001, og tá bleiv alt loftið brotið niður og gjørt av nýggjum. Harafturat er klædningur, vindeygu og gólv alt skift seinnu árini, so talan er um eini heilt onnur hús.